Rithøvundafelag Føroya

## Málráðið

26. mars 2014

Málráðið hevur fundast regluliga síðan tað varð stovnað, og ein starvsnevnd er vald, sum hevur sítt virksemi umframt ráðsfundirnar. Týdningarmikil mál hava verið, og eru enn, á skránni hjá ráðnum. Her kunnu nevnast føroyska stavraðið, stavsetingarorðabók, ráðgevingarstarvsemi fyri fjølmiðlafólk, frøði- og yrkismál, og talgildur málburður og møguleikar/útlit á tí økinum. Málráðið hevur eisini ynski um økt samstarv við samlíkar stovnar og nevndir í hinum Norðanlondunum.

Skal nakað 'neiligt' nevnast, er tað yvirsveimandi hóttanir um yvirgrip frá politiskari síðu mótvegis Málráðnum og tess virksemi. Verður álvari av slíkum, er hetta beinleiðis brot á endamálsorðing og almenna kunngerð um stovnseting av Málráði. Undirritaði hevur ta áskoðan, at fara politikarar at diktera ella blanda seg í starvsemi Málráðsins, eigur tað at svara við at niðurleggja seg sjálvt.
Vónandi verður henda støða ikki veruleiki.

Kári Leivsson
Umboð Rithøvundafelags Føroya í Málráðnum